# Stutt aftursvar til Jóan Paula Joensen

FINNUR HELMSDAL



Eg segði einki í grein míni tann 28. desember um, antin Rúni Rasmussen helt tað vera gott ella rætt at senda 266B út til fólkaatkvøðu. Eg undirstrikaði tað í greinini. Eg undraðist bert yvir, at hann yvir høvur kundi nevna tann møguleikan. Tú sigur, at hann bert nevndi tað sum eitt tekniskt dømi. Veit ikki hvat tað merkir. Men eg spyrji, hvat hevði Jóan Pauli sagt, um Rúni sum eitt reint tekniskt dømi tók, at man kundi spurt Føroya fólk, um tað skal vera loyvi til at stjala ella ei. Um tað skal vera loyvt at neyðtaka ella ei. Tekniskt ella ei, so má mark vera fyri, hvat ávísir persónar siga alment.

# Kann løgmaður vera so órealistiskur og so óseriøsur

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður og samgongulimur



**Hugtikin av friðarløn Nobels og smálánunum hjá Yunus og Grameen banka, samstundis sum hann av øllum alvi vil steðga heimligu vinnulívsmonnum. Er hetta smáborgaraligt ella ber øvund uttan umhugsan**

Nýggjársrøður løgmans fáa altíð atfinningar frá andstøðuleiðarum. Soleiðis hevur verið og soleiðis fer at verða.

Hinvegin haldi eg, uttan at fara ov vítt, at henda nýggjársrøða løgmans uttan samanbering man fara í søguna, sum hin mest løgna, luftiga og fyri føringin óviðkomandi og periferiska.

Møguliga hevur hann ikki lættan leik av so mongum orsøkum.

Við temaðnum, hvussu friðarheiðurslønarmóttakarar Nobels, Muhammad Yunus og Grameen banki, gera sítt arbeiði við at lata fátækum smálán, so tey við fyritøkum kunnu seta føtur undir egið borð, tosar løgmaður um samhaldsfesti, tí sum hann sigur: "Fríu marknaðarkreftirnar greiða so langt ífrá allar trupulleikar".

Ofta hevur verið sagt, at løgmaður undantekur at viðgera egin torgreidd mál, men tosar heldur um onnur meiri ella minni óviðkomandi viðurskifti.

**Yunus, Hanus og Johan Páll**

Tað má tykjast løgið fyri føroyska borgaran, at samstundis, sum løgmaður brúkar út við helmingin av røðuni at vísa hvussu hugtikin hann er av smálánunum hjá Yunus og Grameen banka, mótarbeiðir hann av øllum alvi heimligu vinnulívsfólkum, sum hava goldið og framvegis gjalda hundraðtalsmilliónir út í lønum sum ger, at onnur fáa sett fyritøkur á stovn, sum aftur geva øðrum fólkum og fyritøkum vinnumøguleikar.

Tá Johan Páll Joensen og Frank Uhrenholt keyptu Faroe Seafood Grimsby, mótmælti núverandi løgmaður harðliga og segði alment, at: "Hesir menninir mugu steðgast".

Fyri tveimum árum síðani, tá Hanus Hansen keypti meirilutan í fyritøkuni JFK, ikki bara mótmælti løgmaður gongdini, men ynskti formannin í Føroyagrunninum frá, tí henda fyritøka nú var komin aftur har hon hoyrdi heima, nevniliga á privatar hendur.

Løgmaður vildi hava alt at ganga umaftur, rendi "land og ríki" út í satt óveður, tí hann ikki góðtók hetta, hóast rætt var atborið.

Tíbetur hevði løgmaður ikki "makt, sum hann hevði akt".

**Politikarin má virða vinnulívið og lønmóttakaran**

Spurningurin vendur aftur og aftur, meinar løgmaður nakað við, at vit skulu verða millum fremstu tjóðir í 2015? Er hetta bert tos og dreymar, sum onnur hava ført hann út í?

Hesar viðmerkingar, tí sum hesi trý árini eru farin, eftir at eg var við til at velja Jóannes Ejdesgaard til løgmann, kann bert staðfestast, at hann í mongum førum er bæði órealistiskur og óseriøsur.

Eg fari tí at heita á løgmann og øll okkara løgtingsfólk, latið okkum virða okkara vinnulívsfólk og okkara lønmóttakarar á fría marknaðinum, sum er so grundleggjandi táttur undir okkara framtíðar møguleikum. Latið okkum lækkað øvundatrongdina.

Annars fari eg at ynskja bæði løgmanni, løgtingi og øllum Føroya fólki eitt gott og gróðrarríkt nýggjár við vónum um at land okkara vinnur longur fram í oddinum.

# Deyðadómur í Irak

JOHN WILLIAM JOENSEN
formaður í Norðoya Sambandsfelag



**Støðan í IRAK er at líkna við støðuna eftir seinra heimsbardaga og tí er dómur Sadam Hussains ein neyðug avleiðing**

Tá fyrrverandi forsetin í Irak, Saddam Hussein, varð dømdur og avrættaður, varð formaður Sambandsflokksins siteraður í fjølmiðlunum fyri at siga at rættvísi hevði sigra í Irak.

Hetta var eisini fult í tráð við sjónarmiðini hjá nýggja ST aðalskrivaranum Ban Ki- Moon:

" Saddam Hussein hevði ábyrgdina av andstyggiligum brotsgerðum og ræðuligum harðleikum ímóti sínum fólki, og vit mugu ongantíð gloyma, hvussu umfatandi hansara brotsgerðir vóru!"

Sambært fjølmiðlunum undirstrikar ST aðalskrivarin, at avgerðin um at nýta deyðarevsing er upp til stjórnirnar í teimum ymsu londunum, og at ongin, sum er sekur, eigur at sleppa undan revsing orsakað av síni tingarstøðu.

**Gloyma skjótt**

Vit mugu eisini minnast at IRAK er framvegis í krígsstøðu og uppgerðin við fortíðina undir ræðuliga einaræðinum hjá Hussein ikki enn er liðug.

Fyri bert 60 árum síðan var eisini uppgerð við leiðarar í Nazi Týsklandi og flestu av oddamonnum Hitlers endaðu gálganum.

Eftir at teir sameindu høvdu fríað Danmark og Norra vóru stuðlar hjá týskunum somuleiðis avrættaðir. Á politigarðinum í Keypmannahavn var ein serlig politideild mannað til at taka sær av landasvíkjarum, sum vóru dømdir til deyða.

Landasvíkjarar vóru stillaðir frammanfyri ein betongmúr og skotnir, og ein av "bøðlunum" greiddi fyri stuttum frá í sjónvarpssending at tað stóð ikki á at fáa sjálvboðin at manna serligu politideildina.

**Eiga at stuðla**

Tað man vera ein løgin kensla sum IRAKiskir fólkavaldir politikarar sita við, tá teir hoyra vesturlendingar verja gomlu ilmennini í løgdu landi í oyði við at føra long og kostnaðarmikil kríggj við grannalondini.

Vit hava tíbetur avtikið deyðarevsing á okkara leiðum, tí vit hava í hálva øld liva eina friðarliga tilveru og eru signaði við friði.

Veruleikin í Irak er ein heilt annar og tí eiga vit ikki við okkara sjálvsrættvísi at siga irakiska fólkinum hvussu tey skulu skipað sína rættvísi uppgerð við fortíðina.

# Jenis umboðar bæði himmal- og helvitisekspressuna

FINNUR HELMSDAL
løgtingsmaður



Jenis av Rana hevur, síðan eg saman við Annitu legði uppskotið um at víðka grein 266B í revsilógini fram aðru ferð, áhaldandi roynt at dømt meg og mín persón til heljar. Hann hevur rætt og slætt dømt meg til at vera ein helvitismann. Samstundis hevur maðurin gingið runt við søgum og øðrum um meg, bert við tí endamáli at seta meg í ringt ljós og í teirri vón, at eg fór at leypa fram av undir viðgerðini av málinum.

Skal bert nevna trý dømi, har Jenis hevur roynt at spilla meg út og annars døma meg burtur frá øllum møguleikum at fáa lut í tí ævinleika, sum hann dagliga boðar um.

Fyrsta dømi snýr seg um, at eg sum lærararvikarur fyri 30-35 árum síðan forfylgdi næmingum av ymsum orsøkum. M.a. tí hesir vóru synir ella døtur av fólkum, sum hoyrdu til Brøðrasamkomuna. Kann bara siga væl roynt Jenis, men hevði tú fortalt, at eg favoriseraði baptistabørn, so hevði tú kanska verið eitt vet nærri sannleikanum. Sjálvandi fær man betri samband við nakrar næmingar enn aðrar, men eg havi sjálvandi ikki forfylgt nøkrum teirra. Jenis royndi at lýsa men sum ein persón, ið ikki er tolsamur.

Næsta dømi er frá tingsalinum undir 2. viðgerð av figgjarlógini. Tá tosaði eg upp í saman um at fáa tingfólk til at stuðla undir, at fáa lívfrøðiliga margfeldni í okkara náttúru allýst. Jenis fór upp og vendi øllum á høvdið, hann segði at eg bert hugsaði um at ganga móti náttúruni, og hann skýrdi meg fyri antikrist. Her sipaði hann til uppskotið um revsilógina.

Og nú hevur hann so í blaðgrein skýrt meg og helst flestu tjóðveldisfólk fyri nasistiskar despotar. Hetta í samband við at hann snaraði nøkrum orðum, sum eg skrivaði um, hvat ávísur stjørnmálafrøðingur hevði sagt.

Hetta og mangt annað slíkt kann ein maður, sum er floksformaður, lækni, samkomuleiðari, familjumaður og útvarpsstjóri loyva sær. Men vit sum kenna Jenis vita, at hann sigur og ger slíkt móti betri vitan. Jenis veit væl, at eg havi ikki forfylgt nøkrum næmingi, hann veit væl, at eg eri ikki antikrist, og hann veit væl, at eg so langt frá sympatiseri við nasistiskum despotum. Men hann sigur og ger slíkt fyri at senda bestu hóskandi boðini og somuleiðis myndirnar inn í viðbreknar og aðrar móttakiligar veljarasálir, hetta fyri at vinna so nógvar atkvøður, sum til ber. Tað eru atkvøðurnar sum telja, og so leggur hann vertin á mátan.

Jenis hevur eisini eitt starv aftur at øllum hinum, sum eru nevnd omanfyri. Hann er meira ella minni sjálvsettur stjóri á einari av himmalsku ferðaskrivstovunum her á landi. Og kanska er bæði virksemi og umsetningur størri enn á øðrum líknandi ferðaskrivstovum. Jenis er nevniliga ikki bert umboð fyri himmalekspressuna. Nei, hann útskrivar minst líka nógvar ferðaseðlar til helvitisekspressuna. Sjálvur havi eg fingið neyvt lýstan ferðaseðil frá honum til ta farleiðina.

Vóni bert ikki fyri Jenis av Rana, at hann fer at uppliva tað, at tá hann skal tjekka sína ferð inn til himmals, at hann fær boðini við diskin, at ferðaseðilin er ógyldugur. Og tá Jenis so roynir at siga, at talan er um eina misskiljing, so sigur avgreiðslufólkið við Hann: Jenis, tú fekk alt givið. Tú fekk serstakan intellegens, tú fekk talugávur sum fáur, tú fekk nógv jørðiskt góðs, góða útbúgving, fólk lurtaðu eftir tær, tú hevði alla møguleikar Jenis, men tú gloymdi tað týdningarmesta, nevniliga at hugsa og tosa frá hjartanum. Jenis góði, eingin kann manipulera seg inn um dyrnar, heldur ikki tú.

Sum tingmaður telist tú millum teir klárastu heilarnar, men tú telist eisini millum teir óærligastu, og ikki minst millum teir, sum duga allar best at gera nýtslu av ísakaldari og barbariskar kalkylu.

**Ein søga um kristni**

Kann at enda fortelja eina søgu um frálæru í kristni. Var lærararvikarur í tveimum umførum. Fyrst frá 74 til 77 á Venjingarskúlanum. Síðan tá eg kom heim sum avlæður sosialráðgevi 1980. Var fyrst nakrar góðar og gevandi mánaðar í stokkunum hjá Timburhandlinum, men tók so við vikarstarvi í Kommunuskúlanum í november. Undirvísti m.a. 6. flokk í kristni, og dámdu næmingunum so væl hesa undirvísing, at tey ikki vildu hoyra talan um annað enn kristni í tímunum, beint fyri jól. Fekk tvær reaktiónir frá foreldrum í samband við, at eg hevði 6. flokk í kristni. Tann eina var frá einum pápa, sum sjálvur var trúboðari. Hann gav mær eitt herðaklapp og segði takk fyri, at barn hansara var vorðið væl meira áhugað í bibliusøgu. Hann segði, at barn hansara nú skilti nógv betur tey ymsu líknilsini. Hin reaktiónin var frá foreldrum at næmingi, sum hevði sagt teimum, at eg hevði bannað í kristnitímanum. Og høvdu tey sagt við Absalon, at tey ynsktu at klaga meg í tí sambandinum. Sjálvsagt er tað alt annað enn heppið, at lærarin bannar, meðan undirvíst verður. Men hesar báðar rættiliga ymisku reaktiónirnar søgdu mær ikki so lítið.